# Ísland kann læna

Íslendska stjórnin hevur samtykt at taka stig til at styrkja virðið á íslendsku krónuni, verður tað neyðugt. Tí hevur stjórnin lagt uppskot fyri Altingið um at heimila ríkiskassanum at læna upp til 500 milliardir íslendskar krónur í ár. Málið er at økja gjaldoyragoymsluna hjá Seðlabnkanum. Árni M. Mathiesen, fíggjarmálaráðharri, segði við íslendska útvarpið í gjár, at tað er ikki vist, at lánið verður tikið, hóast stjórnin fær heimildina.



*Íslendska stjórnin tekur stig til at styrkja krónuna*
*(Mynd: Morgunblaðið)*







*Spenningurin er stórur, nú loyst verður til bátaferð*



*Tað krevur fólk at tilreiða og borðreiða 1200 borðiskar við suppu*

vanlukka av hesum. Drongurin varð fluttur á Landssjúkrahúsið í sjúkrabili, og sum skilst hevur hann tað gott.

Forkvinnan í VÍF sigur, at í næstum verður eftirmetingarfundur, og tá verður eisini dagurin ásettur, nær bátastevnan verður komandi ár.

- Fíggjarliga avlopið av stevnuni fer til kapproðrarneystið. Niðara hæddin er liðug, og nú er ovara hæddin eftir at gera, sigur Jóngerð M. Nielsen.



*Jóngerð M. Nielsen, forkvinna í VÍF*



*Fesk suppa er líka sum ein afturvendandi borðreiðing til bátafólk, tá lagt er til bryggju*